# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 02.02.2023 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá undir mál nr. 4.

1. **102-5-2023: Umsókn um sundurbýti – matr.nr. 213l, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 213l, Hvalba, verður býtt sundur í helvt millum báðar eigararnar.
   **Avgerð**:
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

2. **102-51-2021: Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 129d, Hvalba.**
   Søkt verður um byggiloyvi til at umvæla eitt hoyggjhús til sethús. Málið varð á fundi 12.12.2022 beint aftur í Teknisku nevnd, sum skal kanna atkomuviðurskiftini til og frá ognini.
   **Tekniska nevnd 05.12.2022 og 30.01.2023:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi til sethús á matr. nr. 129d, Hvalba.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars sambært BK17. Byggiloyvið er galdandi í tvey ár.

3. **102-94-2022: Umsókn um byggiloyvi til landstøð á havnalagnum í Nesi frá P/F Bakkafrost.**
   Søkt verður um byggiloyvi til landstøð á havnaøkinum og útfylling í sambandi við hetta í verandi bátahyli í Nesi.
   **Tekniska nevnd 30.01.2023:**
   Nevndin er samd um at atkvøða eftir egnari sannføring á kommunustýrisfundinum.

**Vega- og havnanevndin 31.01.2023:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið umsóknina frá P/F Bakkafrost við tilhoyrandi broytingum. Áðrenn loyvi til hesa verkætlan kann gevast, mugu broytingar gerast í býarskipanarkortinum og orðingini í byggisamtyktini.
**Avgerð:**
Samtykt varð við fimm atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini og fara undir at broyta byggisamtyktina samsvarandi verkætlanini.

*Niels Olaf Eyvindsson fór av fundi kl. 17.00 og Poul Laust Christiansen kom inn fyri hann.*

4. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.15

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson Eir J. Norðberg

Martin í Nesi Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen